# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Vit og øll hini

Ein skuldi ikki trúð, at tað bara búgva umleið hálvthundrað túsund fólk her á landi, tá ið vit líta at tí nógva virkseminum, sum er hvørt vikuskifti kring alt landið. Ráðstevnur um alt millum Himmal og Jørð, fundir, skeið, stevnur, festivalar, ja soleiðis kundi verið hildið fram í tað óendaliga. Og juli er einki minni enn ein dampketil í so máta.

Hæddarpunktið er sjálvandi tjóðarhátíðin, ólavsøkan í landsins nalva, Tórshavn. Men upphitingin til tjóðarhátíðina er eisini øgilig. Ein festivalur fyri og annar eftir. Fyri viku síðani savnaðust túsundtals fólk við Múrin í Kirkjubø. Ikki meira enn er tað stóra tiltakið av, so savnast aftur túsundtals fólk til G! í Syðrugøtu.

Tá fólk rakna við aftur eftir ein vónandi væleydnaðan G! Festival, so er tað til eina ólavsøku, sum fevnir um so nógv hugflogið røkkur tað veri seg tónleik, ítrótt, spæl og alskyns tiltøk og samverur, og tá ólavsøkan er farin aftur um bak so fara klaksvíkingar at bjóða seg fram við bæði festivali og sjómannadegi.

Men fyri at geva øllum hesum fulla styrki og fult fokus, so er tað neyðugt við virknum fjølmiðlum. Og her eru vit í Føroyum eisini so mikið heppin ella ágrýtin, at hóast ein rættiliga lítlan marknað, so eiga vit fleiri livandi og umfevnandi fjølmiðlar. Hesa seinastu tíðina hava miðlarnir hjá Miðlahúsinum saman við Kringvarpinum og eisini hinum stóra blaðnum, Dimmalætting og annars lokalu miðlunum roynt at varpa út og skriva bæði undan og frá sjálvum tiltøkunum. Taka vit onnur lond og aðrar tjóðir á somu støðd sum vit ella entá nógv størri, so fylla hvørki tiltøkini sjálv ella miðlavirksemi nær námind tað sama sum her á klettunum úti í Atlantshavi.

Í øllum lívsins viðurskiftum er setningurin hjá okkum øllum at arbeiða við at finna røttu javnvágina. Hetta er eitt nú galdandi fyri arbeiði, vinnu og frítíð og undirhald. Hesa ársins tíðina er, sum omanfyri nevnt, nógv fólkalív og undirhald á skránni, og tað fyllir sum vera man nógv. Avbjóðingin hjá okkum í miðlunum er at vera við, men samtundis ikki at gloyma aðrar týdningarmiklar samfelagsuppgávur. Tá ið vit eftirmeta okkum sjálvi, so halda vit viðhvørt, at vit hava verið beinreikin, og aðrar tíðir halda vit, at vit hava verið minni beinrakin. Hvat, ið størsti denturin verður lagdur á, hevur eisini nakað við árstíðirnar at gera.

Nú ólavsøkan stundar til, royna vit í Miðlahúsinum at brynja okkum til tjóðarhátíðina. Seinastu fimm árini, síðani vit fluttu heim í Vágsbotni, hava vit verið væl vitjaður partur av ólavsøkuskránni, og tað vilja vit fegin eisini verða í ár. Umframt at okkara miðlar verða við til at sjónliggera tiltøk og kappingar, so verða dyrnar í Miðlahúsinum eisini opnar. Í lýsing í blaðnum í dag og í ólavsøkublaðnum er fjølbroytta skráin at síggja. Eingin ivi skal vera um, at vit seta prís uppá, at fólk hyggja inn á gólvið fyri at síggja tað, sum vit vísa fram, og eisini til at heilsa uppá og síggja okkara arbeiðspláss.

**Sosialurin**

# Ótíðarhóskandi landsstýri

**HERGEIR NIELSEN**



Við jøvnum millumbilum síggja vit Edmund Joensen, løgtings- og fólkatingsmann, hartað landsstýrið fyri ikki at taka uttanríkispolitisku viðurskifti Føroya í nóg stórum álvara.

Hesum eru fólk flest samd við honum í.

Saman við Grønlandi liggja Føroyar sum einastu lond í vesturheiminum leysar av teimum stóru handisligu sambondunum, ES og EFTA, og hetta halda vit okkum hava ráð til.

Fyri at skulka okkum undan størri politiskum avgerðum hava vit verið ófør til at seta nevndir og framleiða álit.

Harafturat hava vit verið ófør til at seta kós misvísandi inn í eitt samgonguskjalið fyri og annað eftir.

Vit fingu eitt blátt álit um møguleikarnar fyri samvinnu við Evropeiska Samveldið í august 1995.

Vit fingu eitt reytt álit við frágreiðing um samráðingar við Europeiska Samveldið í juni 1998.

Vit fingu eina ABC I samgongu í januar 2004, sum boðaði frá, at arbeiðast skuldi fyri gagnligastu marknaðaratgongd við ES og onnur lond.

Vit fingu eina ABC II samgongu í septembur 2008, sum boðaði frá einum nýggjum Evropapolitikki.

Í hesum seinasta nosinum skuldu enntá tvey kanningar- og útgreiningararbeiði fáast frá hondini skjótast gjørligt:

a) møguleikan fyri EFTA-limaskapi,
b) treytir eru fyri at gerast partur av ES.

Hóast skjótt eitt ár er farið av hesum skeiðið, so sæst einki til nakað skjótt úrslit, og enn minni til nakað úrslit yvirhøvur.

Samgongumenn eru ístaðin so ósamdir sínámillum um, hvagar leiðin gongur, at ein teirra heldur, at best er bara at gera av við landsstýrismannin í uttanríkismálum.

So fáa vit í hvussu so er frið á tí økinum, tykist hugsanin vera.

Vit skilja væl álvarsomu atfinningarnar, men undrast so eisini yvir, at farið var undir enn eitt skeið undir einum so ótíðarhóskandi landsstýrið.

ABC I var so lítið at sær komið, at Løgtingið ikki so mikið sum fekk eitt einasta uttanríkispolitiskt orðaskiftið øll tey fýra árini, meðan hetta málsøkið lá undir hesum løgmanni.

Sum skilst, so skulu vit ikki væntað okkum stórvegis meira á hesum sinni.

Hava vit ráð til tað?

Vísandi til eldhugan at skriva álit eiga vit ikki at gloyma Visjón 2015, aðalskriftið um mál og vegir hjá hjá Edmundi Joensen og teimum.

Greiða niðurstøðan frá einum av strategibólkunum í hesum riti var, at formligu viðurskifti Føroya við danska ríkið vóru størsta einstaka forðingin fyri, at Føroyar sum land kundu luttaka á jøvnum føti við onnur lond.

Sagt varð, at stjórnarrættarliga støða Føroya var ein avmarking, eitt nú tá tað ráddi um føroyskan limaskap í ymiskum millumtjóða felagsskapum.

Hóast greiðu niðurstøðurnar í árligum ritum, álitum og ráðstevnum, so velja okkara skiftandi landsstýri at seta enn fleiri strategibólkar at siga tey somu tingini enn eina ferð.

Formaðurin í Færøudvalget boðar nú frá, at Ísland fer við ferð framvið okkum, og tað er ein skilagóð eygleiðing.

Í stjórnarrættarligu skipan støðu Íslands er jú eingin avmarking. Ísland kann jú saktans søkja sær limaskap í ymiskum millumtjóða felagsskapum eitt nú ES, vilja teir tað, so har ber til at seta ferð á.

Her hjá okkum er alt so fløkt, at her ber einki til.

Í Føroyum seta vit strategibólkar fjórða hvørt ár til at tryggja okkum, at einki hendir.

# Ónýttir fiskidagar koma vinnuni til góðar

**EYÐGUNN SAMUELSEN**
løgtinskvinna fyri Javnaðarflokkin



Nú er tíðin aftur komin har løgtingi skal áseta tal av fiskidøgum fyri komandi fiskiár. Aftur í ár eru hópin av ónýttum døgum í skipanini. Samanlagt hava bólkur 1-4 bert nýtt 67% av tillutaðu døgunum ímóti 75% í árinum fyri. Aftur í ár eru tvey ymisk tilmæli, eitt frá Havstovuni og hitt frá Fiskidaganevndini.

Sum so er onki nýtt undir sólini.

Tað kann tykjast líkatil at skerja fiskidagatalið komandi ár við nøkrum % og siga at vit hava lurtað eitt sindur eftir báðum pørtum og halda at so stendur væl til. Hetta rakar ongan tí bert nøkur prosent av tillutaðu døgunum verða nýttir, vil onkur siga. Hetta er bara ikki so, við at skerja fiskidagatalið, sum verðandi skipan er samansett, rakar tað tey skip, og teir fiskimenn, ið dríva fiskivinnuna sum eina vinnu meint.

Óbrúkta dagatalið vísir, at vit hava eina skipan við stórum veikleikum, sum enn onki er gjørt við. At skip og bátar ár undan árið kunna eiga ónýttar dagar, uttan at hesir verða drignir inn aftur til landið, er ein stórur trupuleiki. Hesin trupuleiki viðførðir, at ein niðurskurður í døgunum rakar teir ið hava fiskivinnuna sum sín vinnuveg.

Tí kann politiska skipanin ikki halda fram at lata standa til. Ónýttu dagarnir mugu takast inn so ella so, og síðan tillutast teimum ið eru virknir í vinnuni. Vit mugu innføra brúksskyldu, so fiskivinnan verður ein vinna, ið fær bestu karmar at virka undir. Soleiðis leggja vit lunnar undir, at tey ið starvast í vinnuni kunnu fáa góðar inntøkur. Harvið skapa vit eisini okkum øllum eitt sterkari inntøkugrundarlag at byggja okkara tilveru á.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.